## Rógva runt Svalbard

Tann 37 ára gamli ísraelsmaðurin Alon Ohad og tann 32 ára gamli nýsælendingurin Tim Starr hava sett sær fyri at rógva í kajakk rundan um Svalbard. Teir fara undir ferðina í næstu viku og hava roknað út, at tað fer at taka teimum 10 vikur at rógva teir umleið 970 fjórðingarnar. Alon Ohad sigur við eitt blað í Ísrael, at hann stúrir mest fyri at møta einari ísbjørn við Svalbard, sjálvt um hann fer at hava byrsu hjá sær í kajakkini.



*Alon Ohad hevur fyrr róð runt um Írland í kajakk*

*Mynd: Nordlys*

# Landsstýrið temadag í Kelduni

**Undir herrópinum »Samstarvið millum politikarar og embætisfólk« er ein stórur partur av embætisfólkunum hjá landsstýrinum savnaður í Kelduni til temadag**



*Eini hálvtanaðhundrað embætisfólk eru við á temadegnum í Kelduni í Skálabotni*

TEMADAGUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Klokkan 10 í morgun bjóðaði Marjun Hanusardóttir vælkomin til tey umleið hálvtannaðhundrað embætisfólkini, sum eru møtt til temadag í Kelduni í Skálabotni.

Talan verður um ein heilan dag, har fyrraparturin fer til at hoyra fyrilestrar, meðan tað seinnapartin verður arbeittð í bólkum, har evnini, sum hava verið viðgjørd fyrrapartin verða viðgjørd.

Fyrilestrarnir eru býttir upp í tvey evni:

1: Samstarvið millum politikarar og embætisfólk (yvirskipað)
2: Tagnarskylda, loyalitetur og talufrælsi

Løgmaður legði fyri klokkan 10.10 við fyrilestrinum, sum hann nevnir: »Hvat væntar ein politikari sær av sínum embætisfólkum, og hvat kunnu embætisfólk vænta sær av politisku leiðsluni«

Síðani fylgir Tim Knudsen, professari í fyrisiting við fyrilestrinum: »Leiklutur hjá embætisfólki og politikarum« og fyrri partur verður rundaður av við fyrilestri hjá Doris Bjarkhamar og Elin Mortensen, stjórnmálafrøðingar og fyrrverandi næmingar hjá Tim Knudsen: »Leiklutabýtið millum politikarar og embætisfólk í Føroyum«.

Undir tema tvey verða tveir fyrilestrar undir heitinum: »Tagnarskylda, loyalitetur og talufrælsi«. Fyrra heldur Sólja í Ólavstovu, Løgtingsins Umboðsmaður, og hin seinna Øssur Winthereig, redaktøri.

### Bólkaarbeiði

Seinnaparturin verður skipaður við bólkaarbeiði, sum varar í hálvanannan tíma, og eftir ein kaffisteðg verður so framløga í bólkum og spurningar verða fyrireikaðir til panelið, sum verður seinni.

Í panelinum sita Bjørt Samuelsen, Súsanna Danielsen, Herluf Sigvaldsson Poul Geert Hansen og John Rajani. Her verður so viðgjørt gjøgnum spurningar og kjak tey evni, sum hava verið til viðgerðar, og onnur viðkomandi evnir.

Dagurin endar við, at Marjun Hanusardóttir tekur saman um.

---

# Smyril Line fleiri bíleggingar

**Tað er serliga á útlendska marknaðinum, at fleiri bíleggingar eru í ár í mun til í fjør, meðan tað hjá føroyingum er nakað tað sama – kanska eitt lítið vet uppeftir, sigur Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari á Smyril Line**




*Norröna fer at flyta enn fleiri ferðafólk í ár enn teir gjørdu í fjør*

FERÐAVINNA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Summarsiglingin hjá Norrönu byrjar seint í ár. Ikki fyrr enn 16. juni fer Norröna av Hanstholm á fyrsta túrinum í summarsiglingini.

Vit hava valt at halda upp á konseptið, sum vit kalla »Víkinga-cruise«. Hetta eru vikulangir túrar úr Hanstholm til Bergen til Føroya til Íslands og so somu leið niður aftur, sigur Jákup Sverri Kass, marknaðarleiðari á Smyril Line.

Hesir túrarnir eru ógvuliga væl umtóktir hjá serliga týskarum, og tí hevur Smyril Line valt at útseta byrjanina av summarsiglingini og heldur dúva upp á víkinga-cruise.

Føroyingar byrja gjarna ikki at ferðast, fyrr enn summarfrítíðin hjá skúlunum byrjar, og tá víkinga-cruisini hava víst seg at verið væl móttikin, hava vit valt at gjørt á henda hátt, sigur Jákup Sverri Kass.

Marknaðarleiðarin sigur annars, at teir nú eru farnir undir at leggja størri dent á »spacingina«, ella plaseringina av ferðafólkunum umborð á Norrönu. Fyrr hevur tað verið meiri sum bests ber til.

Við at leggja størri dent á spacingina, kunnu vit optimera plássið umborð, sigur Jákup Sverri Kass.

### Mest útlendingar

Fyri einum tíggju árum síðani var býtið millum ferðafólkini 70% føroyingar og 30% útlendingar. Í dag eru tølini viðvend.

Talið av føroyingum, sum ferðast við Norrönu veksu, men bert spakuliga. Hinvegin er økingin í talinum av útlendskum ferðafólki munandi. Og tað er sami tendensur aftur í ár. Talið av føroyingum, sum hava bílagt ferðaseðil við Norrönu er bert kvinkaður eitt vet upp eftir, meðan nógv fleiri útlendingar hava bílagt ferðaseðil í mun til í fjør, sigur Jákup Sverri Kass.

Men hóast talið á bíleggingum er størri enn í fjør, so leggur Jákup Sverri Kass dent á, at eingin túrur enn er útseldur.

Á onkrari fráferð er trongligt, men eingin túrur er útseldur – enn, sigur Jákup Sverri Kass.

Av útlendingum, sum ferðast við Norrönu, eru flestir týskarar, teimum á baki koma danir, síðani norðmenn og so íslendingar, hollendarar og fraklendingar. Talið av bretum vindur upp á seg, og eisini eru italiumenn farnir at ferðast við Norrönu.

Vit merkja eisini, at talið av fraklendingum veksur, nú Norröna er farin at sigla upp á Scrabster. Nú kunnu teir koyra úr Fraklandi beinleiðis upp til Scrabster og uppliva Ongland á vegnum, sigur Jákup Sverri Kass.